P/f Føroya Shell:

# Dreingjadreymurin gjørdist veruleiki

**Sunnudagin 26. september 2004 fingu tríggir føroyingar høvi at gera ein dreingjadreym til veruleika, tá teir sluppu at koyra í Ferrari 348 á Sturup Raceway bananum tætt við Malmø í Svøríki**

KAPPKOYRING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

At koyra ein ordiligan Ferrari á eini kappkoyringarbreyt man vera ein dreymur hjá flestu dreingjum, sum hava áhuga fyri bilum og motorsporti.

Hetta upplivdu teir tríggir føroyingarnir, Erling í Liða, Ásmund Joensen og Tummas Pauli Vilhelm, tá teir saman við øðrum sluppu at royna seg sum kappkoyrarar.

Túrurin varð gjørdur í samband við at Ásmund Joensen frá Berg Motors og Tummas Pauli Vilhelm frá P/F Meinhardt Arge, vóru teir hepnu vinnararnir av einari spennandi ferð við Shell til Svøríkis, har teir fingu møguleika at koyra skjótt á Sturup Raceway bananum tætt við Malmø. Við á ferðini var Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðari hjá Føroya Shell.

Hetta var onnur virðisløn í kappingini SHELL HELIX GRAND PRIX, sum Shell hevur á øllum bilasølunum og verkstøðunum í Føroyum. Fyrsta virðisløn var ein ferð til Formel 1 á San Marino bananum í Italia tann 25. apríl í ár.

Við í ferðalagnum til Sturup vóru 11 spentir persónar, sum gleddu seg til at sleppa at royna seg aftanfyri róðrið á ymiskum spennandi bilum.

Teir møttu sunnudagin 26. september kl. 12.00, tá byrjað varð við frokosti og kunning um dagin. Eisini fingu teir kunning um hvørjir reglar vóru galdandi á bananum, og eisini hvat slag av bilum teir sluppu at royna.

Fyrst sluppu allir at koyra Go-kart í einar 20 min. frítt á bananum. Aftaná varð liðið býtt í helvt, har teir koyrdu Alfa Romeo 147 í umleið 20 umfør býtt upp í venjing og síðani fría kapping við fullari ferð. High-speed túrurin í Ferrari 348 var trý umfør við vegleiðara undir liðini. Hesin var Martin Jensen, ið er professionellur rally-koyrari í DTC-klassanum, har hann er millum teir fremstu.

Eftir kappingarnar varð gjørd ein samlað samanteljing av øllum trimum kappingunum, har tríggir teir bestu fingu handað steyp og medaljur, og allir fingu eitt luttøkuskjal.

Nr. 1, 2 og 3 sluppa harafturat at sita við síðuna av Martin Jensen, sum koyrdi tvey umfør við hvørjum við fullari ferð, har hann vísti síni koyrikynstur.

Samanumtikið ein sera spennandi ferð, har allir luttakararnir fóru glaðir og móðir heim aftur um nátturðatíð í bussi til Keypmannahavnar.

Teir tríggir føroyingarnir siga, at teir fingu eina upplivíng, sum teir seint fara at gloyma.



*Tummas Pauli Vilhelm, Ásmund Joensen og Erling í Liða bíða spentir eftir at sleppa at koyra Ferrari og royna seg sum kappkoyrarar*



*Allir luttakararnir á veg heim eftir at hava roynt seg sum kappkoyrarar í ein dag*



*Ásmund Joensen og Tummas Pauli Vilhelm bíða eftir teirra tørni*




*Ásmund Joensen í Ferrari. At koyra sum kappkoyrari er ikki heilt tað sama sum at koyra skúlabuss til Velbastaðar*



*Eftir kappingarnar fingu tríggir teir bestu handað steyp og medaljur, og allir fingu eitt luttøkuskjal. Erling í Liða (uttast til høgru) bleiv samanlagt nr. 3*



*Kappingin byrjaði við Go-kart koyring, f.v. Erling í Liða, Tummas Pauli Vilhelm og Ásmund Joensen*

# ítróttur

Nr. 196 • hósdagur • 14. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Seinasti dysturin

**Tá dysturi á Landsdowne Road er av, er ein av teimum heilt drúgvu føroysku landsliðsleikarunum eisini liðugur**

VETERANUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

**Dublin, Írland:** Sjálvur hevur hann helst vitað tað í eina tíð, men tað var ikki fyrr enn nú, at Henrik Larsen fekk boðini. John Petersen, sum í næstum flytur til Danmarkar at búgva, hevur gjørt upp við seg sjálvan, at hann gevst á landsliðnum, tá dysturin móti Írlandi er av.

- Tað var ikki sørt, at nógv varð gjørt burturúr. Fleiri av leikarunum hildu røður, tá vit ótu týsdagin, so tað var næstan soleiðis, at eg varð heilt rørdur, sigur hann.

Men tú hevur nú eisini verið ein av teimum heilt drúgvu á landsliðnum. Verður tað ikki ein serlig løta hjá tær, tá tú mikudagin fer at takka áskoðarunum fyri seinasta dystin?

- Sjálvandi verður tað tað. Sjálvur vóni eg, at tað verðu til eina byrjan millum teir fyrstu ellivu, men bara eg fái eina løtu á vøllinum, so er tað í lagi, heldur veteranurin.

## Nógvar løtur

Við 56 skrásettur landsdystum og 6 landsliðsmálum, er John tann fjórði mest royndi leikarin í hópinum, samstundis sum hann er tann, ið hevur funnið veg til meskarnar oftast.

Spurdur, hvørt tað er nøkur løta hesi árini, sum hevur verið heilt serlig, sigur hann, at har hava verið nógvar slíkar.

- Tað er trupult hjá mær, at taka nakra einstaka løtu framum, tí har hevur verið so nógv. Men tað var fantastiskt, tá eg fyri fyrstu ferð slapp í hópin í '95, og tá eg tríggjar dystir seinni slapp at byrja inni, var tað ein heilt ótrúlig kensla, og at eg eisini skoraði mítt fyrsta mál ta ferðina, gjørdi tað ikki minni serligt.

- Og so eru tað allar tær stóru tjóðirnar, sum vit hava hitt. Tað fær ikki verið annað enn ein dreymur, tá tú sleppur at royna teg móti eitt nú Týsklandi, Fraklandi og Danmark. Og so vóru tað sjálvandi eisini hasi bæði málini, sum eg skeyt móti Skotlandi. Jú, har hava verið heilt nógvar góðar løtur, sigur John.

## Framtíðar 12. maður

Og hann leggur dent á, at góðu løturnar við landsliðnum ikki eru av, fyri tað um hann nú gevst.

- Eg flyti sum sagt niður, og so komii eg ikki at hava nakrar serliga umstøður til at gera nóg nógv við fótbóltin. Tað er tó einki at ivast í, at eg ætli mær onkra ferðina sum 12. maður. Eg fari í øllum førum altíð at fylgja spentur við, hvussu tað gongst landsliðnum, sigur ein mest sum sorgblíður John Petersen at enda.

Og tað er einki at ivast í, at verandi 12. maðurin fer at takka John, tá hann fer av vøllinum eftir evstamark okkara mikukvøldið. Síðani hann fyrstu ferðina kom á liðnum, hevur hann støðugt verið millum bestu leikararnar á liðnum, og týdningur hansara fyri liðið kann valla yvirmetast.




*Mikukvøldið var seinasta ferðin, at John Petersen spældi í reyðu, bláu og hvítu troyggjuni., Leiðin gongur nú til Viborg, og so er liðugt við landsliðsfótbólti*

# Eivør við írskum vinum

**Týskvøldið hevði føroyska Eivør Pálsdóttir framførslu í Dublin, har hon sum ikki einaferð megnaði at rúnarbinda fjøldina**

TÓNLEIKUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*



*Hóast hon alla tíðina tosaði enskt á pallinum, so hevði hon hug at smílast, tá okkurt føroyskt róp kom úr salinum*

**Dublin, Írland:** At føroyska landsliðið ferðast uttanlands, ger í nógvum førum, at møguleikar opna seg, sum annars ikki høvdu verið opnir.

Og ein av hesum møguleikum tók Eivør Pálsdóttir av, tá hon týsdagin hevði framførslu á hugnaliga Hotel Holiday Inn, har trý írsk nøvn eisini vóru á skránni, umframt Eivør.

Og einki er at ivast í, at tað var Eivør, sum flestu fólkini vóru komin at lurta eftir. Hóast hon alla tíðina tosaði enskt á pallinum, so hevði hon hug at smílast, tá okkurt føroyskt róp kom úr salinum, og tá øll fjøldin sang við til »mær leingist«, mundi hon ikki ivast í, at her vóru fólk, sum vóru góð við seg.

Tað vóru tó ikki bara føroyingar, sum vóru á staðnum. Annar helmingurin av fólkinum mundi vera úr Írlandi, og tó at tey ikki altíð skiltu tekstirnar, so tóktist ikki nakar ivi vera um, at hetta eisini var ein hugtakandi løta fyri tey.

Og tað var tað so sanniliga eisini, tá tann lokala Roisin Elsafty trein á pallin. Enn er hon kanska ikki nakað stórt navn, men tað hevur hon allar møguleikar at gerast. Fjøldin sat sum á nálum, tá syrgiligar írskar og skotskar vórðu framførdar uttan hjálp frá nøkrum øðrum enn røddini.

Afturat sær hevði Eivør annars Cora Lunny, sum spælir violin, og eins og restin av kvøldinum, so eydnaðist samspælið teirra millum væl. Eisini hóast tær bert høvdu kent hvønn annan í tveir tímar. Og tá allar tríggjar at enda fóru upp á pallin, mundi fagnaðurin ongan enda tikið. Um tað vóru føroyingar ella írar, sum høvdu sigrað, var kanska óvist, og sum so var tað eisini líkamikið. Øll í salinum høvdu havt eina framúr løtu, har vakur tónleikur slapp at vera í hásætinum.